# the Faroooees«



*Stemningurin í flogbóltshøllini hevur verið framúr. Ikki minst takkað verið Paul Johnsson, sum altíð er í okkara parti, tá dystir skulu spælast*

fínt. Spælarar og áskoðarar úr Føroyum, Grønladi, Álandi. Ja, í veruleikanum hava vit øll fingið nakrar veldugar upplivingar í flogbóltshøllini. Og enn eru bestu dystirnir kanska eftir, staðfesti Paul at enda, áðrenn mikrofonin og krevjandi áskoðararnir aftur kravdu skjóttgangandi mussaskøði yvir at mikrofonini.





*Ikki minst er tað føroyska kvinnulandsliðið, sum hevur vakt ans hjá nýggja Føroya-fjepparanum*



# Vinnararnir

**Liðskiparin hjá Bermuda hevði bara rósur at bera føroyska liðnum. Men hann legði afturat, at nógv og hart arbeiði lá handan sigurin hjá honum og hansara monnum**

FLOGBÓLTUR

*Jákup/Jens Kristian*

Sum vera man, so var fagnaðurin á Bermudaliðnum øgiligur, tá sigurin á favorittunum úr Føroyum var veruleiki.

Eftir dystin skiftu vit orð við liðskiparan á liðnum, Mark Coy, og hóast fegin, so hevði hann samstundis bara rósur at bera føroyska liðnum.

- Føroyska liðið er ótrúliga sterkt. Tað vistu vit frammanundan, og vit vistu, at hetta fór at verða ein trupul uppgáva.

*Heima í Føroyum mundu tey flestu rokna við, at okkara lið skuldi vinna seg beina leið í finaluna. Hvussu mettu tit um tykkara møguleikar undan dystinum?*

- Vit vistu, at vit vóru í topp-trý av liðunum. Vit hava arbeitt hart síðani seinastu leikir, og vit høvdu vónað, at vit eisini kundu basa Saaremaa í bólkaspælinum. Tað gekk ikki, men tíbetur eydnaðist so kortini at vinna á Føroyum í dag. Men tað var sera hart, skal eg leggja afturat.

Tað tóktist eisini, sum tit hugsaðu meira um spælið enn um dómaran. Kendu tit á tykkum, at hetta frustreraði føroyska spælið.

- Sjálvandi roynir tú at siga okkurt við netið, men tað er ikki nakað, sum generar okkum. Mistøk og rok er nakað, sum vit eru vanir við heima á Bermuda, so tað var ikki nakað, sum nervaði yvirhøvur, segði Mark Coy, áðrenn vit at enda ynsktu honum og liðnum tillukku við sigrinum.



*Fagnaðurin var ovurstórur, tá sigurin á favorittunum var veruleiki. Føroysku spælararnir tykjast hinvegin vita við sær sjálvum, at hetta kundu teir gjørt betri*